52-074/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 74/ 2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, um ábyrgd av koronufyribyrgjandi tiltøkum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør hevur evstu ábyrgdina av koronustrategiini í Føroyum?
2. Hvør tekur endaligu avgerðina um tey fyribyrgjandi átøk, sum landsstýrið velur at seta í verk, og hvør tekur endaligu avgerðina í teimum førum, har tilmæli frá farsóttarnevndini ikki verða fylgd?
3. Hvat merkir tað, tá løgmaður sigur "tá valdi mann", "vit hava valt" ella "valdu vit í landsstýrinum" – eru tað landsstýrisfólkini í felag, partar av landsstýrinum, meirilutin av landsstýrinum ella nakar annar saman við hesum, ið sipað verður til, tá løgmaður umrøður tiknar avgerðir?
4. Í hvussu nógvum førum hevur løgmaður/heilsumálaráðharrin/landsstýrið/partar av landsstýrinum valt ikki at fylgja ávísum tilráðingum frá farsóttarnevndini?
5. Er nøkur langtíðar koronustrategi løgd, og um ja, hvør leggur/hevur lagt hesa?

Svar:

Til spurning 1 - 3:

Ábyrgdin av koronustrategiini í Føroyum er samansett millum landsstýrið og teir myndugleikar, sum fyrisita málsøkið smittandi sjúkur. Málsøkið smittandi sjúkur er ikki yvirtikið.

Hetta merkir, at tað eru ríkismyndugleikarnir, sum lóggeva á hesum økinum í Føroyum í lógini um smittandi sjúkur. Tað er soleiðis Landslæknin og Farsóttarnevndin, ið útinna lóggávuheimildirnar. Í Farsóttarnevndini sita fútin, landslæknin, landsdjóralæknin, stjórin á Gjaldstovuni, stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum føddir limir, og landsstýrið velur tríggjar limir afturat hesum.

Eftir lógini hevur Farsóttarnevndin víðfevndar heimildir at seta ymisk tiltøk í verk í Føroyum at basa smittandi sjúku og hevur í hesum sambandi, um neyðugt, loyvi at nýta tvingsul mótvegis almennum myndugleikum, mentanarstovnum, felagsskapum, vinnufyritøkum og privatum.

Hóast sjálvt málsøkið liggur í Danmark, hava føroyskir myndugleikar eisini ábyrgd av at berja niður koronamittuna. Ein sektorábyrgd er hjá øllum teim ymsu sektorunum í Føroyum at gera sítt til at berja niður koronasjúkuna. Tað verið seg land, kommunur ella privat.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Landsstýrismenninir á ymsu økjunum kunnu geva ymsu landsstovnunum boð um, hvussu teir skulu bera seg at fyri at berja niður smittuna. Tað sama kann borgarstjórin í einstøku kommununum og leiðslurnar fyri kommunalu felagsskapirnar.

Løgmaður samskipar øll tey tiltøk sum einstøku sektorarnir undir landi og kommunum seta í verk. Eisini hevur løgmaður um hendið tey almennu tilmælini, sum send verða út frá landsstýrinum, um hvussu almenningurin eigur at bera seg at at forða fyri, at korona ikki spjaðir seg. Hetta verður gjørt grundað á tilmæli frá Farsóttarnevndini.

Til spurning 4:

Farsóttarnevndin er ráðgevandi myndugleiki hjá landsstýrinum og kemur við tilmælum til landsstýrið. Landsstýrið hevur fylgt teimum flestu av tilmælunum frá Farsóttarnevndini.

Til spurning 5:

Yvirskipaða málið hjá landsstýrinum hevur verið at leiða Føroya fólk trygt gjøgnum koronukreppuna, soleiðis at Føroya fólk kemur so væl burturúr henni, sum gjørligt. Bæði menniskjaliga, búskaparliga og heilsuliga.

Harumframt hevur málið eisini verið, at Føroya fólk skal kunna liva so frælst sum gjørligt.

Fyri at røkka hesum málinum kann landsstýrið nýta ymisk amboð. Eitt nú, koppseting, innlendis kanningar, smittusporan, avbyrging og sóttarhald umframt møguleikan at lata samfelagið aftur í størri og minni mun.

Landsstýrið hevur tann 9. November 2021 kunngjørt eina langtíðarætlan fyri koronutilbúgvingina. Hendan ætlan byggir á eina ferðsluljósskipan við trimum stigum: reytt, gult og grønt. Hendan skipan er sett í verk í samráð við Farsóttarnevndina.

Tað er landsstýrið, sum eftir tilráðing frá Farsóttarnevndini ger av og upplýsir, nær skift verður millum stigini.

Samanumtikið hevur tað verið avgerandi hjá landsstýrinum at brúka tey amboðini, sum á bestan hátt tryggja, at vit røkka yvirskipaða málinum.

Í Tinganesi, 10. november 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður